# Instruks

## Arbeiðstíðsskráseting v.m. (Vaktplan) hjá útbúgvingarlæknum í almen praksis

**Formål**
At hava greiðar ásetingar um skyldur og ábyrgd hjá útbúgvingarlækna, tutor og samskipara í samband við føring av vaktplan/arbeiðsskráseting v.m. hjá útbúgvingarlækna í almen medicin tíðarskeið tá teir hava tænastu hjá kommunulækna/almen praksis.

**Definition af begreber**
**Útbúgvingarlækni:** Hjálparlækni í útbúgvingarstarvi (KBU-, intro- ella høvuðsútbúgvingarstarvi í almen medicin).
**Tutor/vegleiðari:** Kommunulækni, ið varðar av kliniska uppihaldinum v.m. hjá útbúgvingarlæknanum.
**Samskipari Útbúgvingarnevndin:** Helena S. Mikkelsen, stjórnarskrivari/ skrivari í útbúgvingarnevndini fyri víðariútbúgving av yngri læknum.

**Beskrivelse**

**1. Normtíð**
Útbúgvingarlæknar í almen praksis hava 40 tíma normtíð/arbeiðsviku íroknað matarsteðg, ið skal haldast og kann ikki mótroknast í longdini av arbeiðsdegnum. Vanliga liggur arbeiðstíðin í dagtíð yrkadagar millum 08-17, tó skal útbúgvingarlæknin hava ávíst tal av vaktum uttanfyri vanliga arbeiðstíð sbrt. útbúgvingarskránni (sí ref. e. og g og pkt. 6) , ið verða avspákaðar sbrt. galdandi reglum.

**2. Føra vaktplan-skema dagliga**
a). Útbúgvingarlækni fær áðrenn byrjanina av hvørjum mánaða sendandi 'Personlig månedsplan' frá Lønar- og starvsfólkadeildini. Á skemanum er forprentaður 8 tíma arbeiðsdagur. Dagliga førir yngri læknin á skemaið um arbeiðsdagurin víkir frá ásettu longdini av arbeiðsdegnum, og áteknar um sjúku, skeið, frí, heima hjá sjúkum barni v.m.
b). Skemaðið verður við endan av mánaðinum at vátta av tutor/vegleiðaranum við atliti um tað er rætt ført, skannað og maila til ls@ls.fo . Samlaða ásetta tímatalið má stemma yvir ásetta 6/12 mánaðar tíðarskeiði. Møguligt eyka arbeiði onkrar dagar ella vaktir avspákast/útjavnast aðrar dagar innanfyri samlaðu normtíðina og førast í skemanum. Undantak um útgjald krevur góðkenning frá samskiparanum.

**3. Broytingar**
Ásetta arbeiðsvikan kann ikki broytast uttan við avtalu við tutor ella samskipara frammanundan. Sí tó viðv. kravdum vaktum í pkt. 1 og 6.

**4. Tá kommunulæknin (tutor) hevur forfall (sí ref. f. og h.)**
Eftir nærri vegleiðing frá tutor virkar útbúgvingarlæknin sum vanligt. Í øðrum lagi kann tíðin lutvíst brúkast til førleikamenning, dygdarmenning, gransking o.l. í tráð við útbúgvingarmálini og –skipanina. Seravtala um at virka sjálvstøðug og fáa heilsutrygdarveitingar krevur avtalu við Heilsutrygd og góðkenning frá tutor og samskiparanum. Læknar í KBU-starvi kunnu ikki virka sjálvstøðugt.

**5. Feriuráðlegging (sí ref. h)**
Verður ásett í samráð millum tutor og útbúgvingarlækna og skal sendast til góðkenningar hjá samskiparanum.

**6. Vakt í kommunulæknavaktini/1870 og koyrivakt (sí ref. e)**
Eitt nærri tilskilað tal av vaktum skulu takast sum partur av útbúgvingarskránni og undir ábyrgd hjá tutor. Í fasu 2 og 3 eru ávíst tal av vaktum uttan supervisión. Útbúgvingarlæknin má tá antin skriva tímar ella virka sjálvstøðugt og fáa heilsutrygdarveitingar sbrt. avtalu við Heilstrygd. Læknar í KBU-starvi kunnu ikki taka sjálvstøðugar vaktir.

Útbúgvingarlækni kann harumframt taka vaktir í kommunulæknavaktini, men mugu hesar ikki verða ov tíðugt og ikki ganga út yvir dagarbeiðsskyldurnar hjá útbúgvingarlæknanum.

**Referancer**

a). http://lssp/PLI/Sider/Skyldur-í-sambandi-við-vaktplanskipanina.aspx
b). http://lssp/PLI/Sider/Leiðregla-fyri-innleiðslu-av-nýggjum-læknum-í-introstarvi-og-útbúgvingarstarvi-innan-Almen-medicin.aspx
c). http://lssp/PLI/Sider/Viðvíkjandi-luttøku-á-ikki-kravdum-skeiðum-hjá-yngri-læknum.aspx
d). http://www.fmr.fo/Index.asp?pID={8D82447C-D2A2-4C1A-A6F4-773CBAEF75B7}#{69661E1E-A019-468F-AB08-077A23EDA2A4}
e). http://www.dsam.dk/files/191/kvalifikationskort_7_laegevagt_forskningstraening_iv.pdf
f). http://www.dsam.dk/flx/uddannelse/videreuddannelse_i_almen_medicin/krav_til_tutorpraksis/9_krav_om_tilstedevaerelse_af_tutorlaege/
g). http://sundhedsstyrelsen.dk/da/uddannelse-autorisation/special-og-videreuddannelse/laege/maalbeskrivelser-i-speciallaegeuddannelsen/~/media/8F03E1CF1AA14EA58F160E5CA26E0DDC.ashx
h). § 3 í galdandi sáttmála millum FYL og FMR/LND.

Dokument
**Faglig ansvarlig**
Sigurð Ó. Vang
**Revideres senest (max. 3 år)**
03-10-2017 13:55
**Revisionsansvarlig**
Sigurð Ó. Vang
**AGREE evalueret**
Nej
**Godkendelse status**
Godkendt
**Version**
2.0
**Godkendt af**
Sigurð Ó. Vang
**Forfatter**
Sigurð Ó. Vang
Helena Skaalum Mikkelsen
**Træder i kraft**
24-02-2015 00:00
**Erstatter**
Dokument område
**Fagspeciale**
Administration
**Målgruppe**
Hjálparlæknar; Skrivstovuassistentar; Stjórn
**Dokumentniveau**
Instruks - Administrativ
**Gældende for**
Fyrisitingin; Lønar- og starvsfólkadeild; Stjórnarskrivstovan; Sjúkrahússtjórnin